# Tórgerð Suðuroy í Hafnafirði

*Tá ið Tórgerð Suðuroy í síni tíð hevði ætlanir um at útbúgva seg til gullsmið, gjørdi hon ikki mætari enn at lata eina gullsmiðju upp og fór í læru á sínum egna verkstaði*



**Næstu tvær vikurnar hava íslendingar høvi at ogna sær smúkkur, sum Tórgerð Suðuroy hevur evnað og framleitt**

MENTAN
*Turið Kjølbro*

Í hesum døgum fram til 25. november er silvur- og gullsmiðurin, Tórgerð Suðuroy, gestur í Mentunarhúsinum í Hafnarfirði í Íslandi.

Tórgerð Suðuroy hevur arbeitt og gjørt royndir við silvursmúkkum seinastu 20 árini. Hon er útbúgvin í yrkinum silvurleggjan í Danmark. Tá ið hon í síni tíð hevði ætlanir um at útbúgva seg til gullsmið, gjørdi hon ikki mætari enn at lata eina gullsmiðju upp og fór í læru á sínum egna verkstaði. Í dag er hon ein av teim fáu í danska kongaríkinum, sum sjálv tilevnar smúkkur, stoypir og annaðhvørt silvuleggur ella gullleggur tær í sínum egna verkstaði í Suðuroy. Á henda hátt er hon við í tilgongdini frá byrjan til enda. Eitt nú silvurleggur hon fiskabein við somu mannagongd sum danska Flora Danica verður gjørd.

Silvurlegging er í dag eitt yrki, sum ikki í sama mun sum fyrr verður gjørt á verkstøðum. Flestu smúkkuframleiðarar senda úrdráttir sínar til silvurlegging á størri verksmiðjur. Tilgongdin at silvurleggja er ógvuliga umfatandi evnisfrøðiliga, umframt at hon er sera vandamikil.

Tórgerð Suðuroy hevur áður verið í Íslandi við sínum smúkkum. Tað var í 1995, tá ið hon sýndi fram í Kringluni í Reykjavík. Umframt at selja smúkkur ta ferðina, átók hon sær eisini at silvurleggja barnaskógvar og tátur fyri íslendingar. Og íslendingar tóku væl ímóti tilboðnum, skilst.

# Politikarar vóru við

Í grein í leygardagsblaðnum skrivaðu vit, at hvørki lands- ella kommunalpolitikkarar vístu seg undir samráðingunum ella semingsroyndunum, tá ið Føroya Pedagogfelag samráddist við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálastýrið. Hetta er ikki rætt. Tá ið semingin byrjaði, vóru politikarar til staðar tað mesta av tíðini. Pedagogfelagið fegnast um, at teir á henda hátt vísa ábyrgd.

# 34 nýggj stovnspláss tøk

**Tíðliga í komandi ári letur nýggi barnagarðurin hjá Føroya Tele upp við plássum fyri 12 vøggustovubørnum og 22 barnagarðsbørnum**

BARNAGARÐUR
*Turið Kjølbro*



*Dagstovnurin hjá Føroya Tele fær ein útbygning, sum verður vøggustova*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fyrst í komandi ári letur nýggi barnagarðurin hjá Føroya Tele upp. Leiðari er settur, tað er Durita Dam, og í løtuni verður søkt eftir pedagogum og hjálparfólkum.

Eftir drúgva leitan keypti Føroya Tele fyri nøkrum mánaðum síðani eini sethús við Norðara Ringveg í Havn. Hesi verða nú umbygd og útbygd til dagstovn. Útbyggingin er í fermetratali líka stór sum onnur hæddin á húsunum. Í nýggju hølunum verður vøggustova og í húsunum barnagarður. Í vøggustovuni verður pláss fyri 12 børnum og í barnagarðinum 22 børnum. Roknað verður við, at starvsfólk á Føroya Tele tørvar tveir triðingar av tøku plássunum. Fara starvsfólkini á Føroya Tele í onnur størv, varðveita børnini plássið á dagstovninum. Eisini um mamman ella pápin fara í starv hjá kappingarneytanum. Restin av tøku plássunum í nýggja barnagarðinum verður til Tórshavnar býráð at ráða yvir.

Hvussu nógv húsini og umbyggingin kosta Føroya Tele, vil stovnurin ikki upplýsa. Nýggi dagstovnurin liggur beint út til ein ferðsluríkan veg. Girðingar verða sjálvsagt settar upp, soleiðis at børnini ikki koma í nánd av ferðsluni. Stovnurin liggur í aðrar mátar tætt við sera náttúrvøkur fríøki. Svartafoss longur uppi og Gundadal eitt vet longur niðri. Økið rundan um stovnin er eisini stórt. Grundstykkið er 600 fermetrar. Afturat hevur Føroya Tele keypt 200 fermetrar og leigað 6-700 metrar.

Síðani á vári í fjør hevur Føroya Tele leitað eftir hóskandi húsum at keypa til barnagarð, og tað er eingin loyna, at tað hevur gingið sera striltið, hóast ávís hús hava verið í uppskoti. Nú tað endiliga eydnaðist, gleða starvsfólk á Føroya Tele seg til, at stovnurin letur upp tíðliga í nýggja árinum.

# Føroyskir skúlanæmingar til Aberdeen

**Næmingar úr teknisku skúlunum í Havn og í Klaksvík fara síðst í hesum mánaðinum til Aberdeen í Skotlandi. Ørindini hjá teimum eru m.a. at kunna seg um oljuvinnuna, og næmingarnir fáa eisini møguleikan at royna seg**

FERÐ
*Heri á Rógvi*



*Eva Maria Gregersen, v.m. og Bergtóra Joensen eru partar av ferðalagnum, sum fer til Skotlands seinni í mánaðinum at læra meira um oljuvinnuna.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

At oljuvinna so smátt er farin at gera seg galdandi í Føroyum hevur fingið ymsar fylgjur. Umframt, at flestu føroyingar droyma um ómetaligt oljuríkidømi, so hevur hetta eisini merkt, at fleiri føroyingar eru farnir aktivt upp í oljuvinnuna. Eisini hava fleiri føroyingar valt at útbúgva seg innanfyri oljuvinnuna, tá ið tey hava sannað, at tað eru pengar at vinna.

Støðan í dag er tann, at størsti parturin av fólkunum í føroysku oljuvinnuni eru útlendingar, men tað teljast føroyingar upp í millum.

Kanska hetta býtið í framtíðini fer at broytast. Í øllum førum fara næmingar úr teknisku skúlunum í Havn og í Klaksvík til Aberdeen seinni í hesum mánaðinum.

## Teori og praksis

Vitjanin hjá næmingunum verður í eina góða viku. Ferðalagið telur sekstan næmingar, átta úr hvørjum skúla. Tey fara avstað 26. november og koma aftur 3. desember. Meðan næmingar eru yvir í Aberdeen, so skulu teir halda til á einari oljudeild hjá Aberdeen College. Næmingarnir skulu sita á skúlabeinki fyrrapart. Seinnapartin av degnum fáa næmingarnir veruliga møguleikan at royna seg og at fáa fingrarnar skitnar. Næmingarnir verða býttir í bólkar og koma at halda til á nøkrum sum líkist einum eftirgjørdum boripalli.

Tað er Asset (Aberdeen College), sum hevur bjóðað føroyskum næmingunum til Skotlands at læra meira um oljuvinnuna. Eftir hvat skilst á lagnum, so fara tey at taka sær væl av føroysku næmingunum. Næmingarnir skulu ikki hava annað enn sínar persónligu lutir við, alt hitt verður syrgt fyri frá skotskari síðu.

Ferðin verður fíggjað úr Føroyum, og næmingarnir sjálvir skulu ikki gjalda fyri ferðing ella uppihald.

## Glaðar fyri møguleikan

Tveir ella rættari sagt tvær av teimum, sum skulu til Skotlands seinni í mánaðinum, eru Eva Maria Gregersen og Bergtóra Joensen. Tær eru ávíkavíst av Eiði og úr Fuglafirði. Báðar eru tær SIT´arir. Tá ið tær báðar frættu um túrin til Skotlands, so tóku tær beinanvegin støðu til, at hetta var nakað, ið tær kundu hugsað sær at roynt. Tær meldaðu seg til, og tað vísti seg eisini, at tær sluppu við.

- Vit rokna við, at hetta verður eitt spennandi upplivilsi, og hetta er eisini eitt heldur serligt høvi, siga tær báðar í felag.

Tær báðar eru í løtuni millum tær 11 á hárfríðkanardeildini hjá Tekniska Skúla í Havn. Tær báðar siga seg eisini vera rættiliga forvitnar fyri at vita, hvat skúlin í Skotlandi hevur at bjóða uppá, og tær avvísa ikki, at hetta kann fara at ávirka tær framtíðar yrkisleið, men fyrst og fremst vilja tær sleppa at royna hetta.

Tær siga seg hava gott mót, og tær gleða seg til at fáa tað síðsta tilfarið, áðrenn tær skulu avstað.



# Endaspurturin avger valið

*Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur undirstrikar, at tað er so tætt í veljarakanningini, at endaspurturin í valstríðnum fer at gera av, hvør verður valdur*



**Veljarakanningin eigur at takast við størsta fyrivarni. Sannlíkt er at stóru flokkarnir fara at liggja lið um lið, og tí fer tað at hava avgerandi týdning fyri úrslitið, hvussu flokkarnir klára seg í orðaskiftinum heldur samfelagsfrøðingur**

FÓLKATINGSVAL
*Jan Müller*

- Henda vikan verður avgerandi fyri, hvør fer at fáa teir báðar fólkatingsmenninar, og tí hevur orðaskiftið í fjølmiðlunum avgerandi ávirkan á, hvussu veljararnir fara at atkvøða 20. november. Hetta sigur Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur í eini viðmerking til veljarakanningina, sum Fynd hevur gjørt fyri útvarpið.

Jógvan Mørkøre sigur, at hóast munur er á teimum fýra stóru flokkunum, so skulu tølini takast við størsta fyrivarni. Hann heldur, at her lættliga kann blíva talan um eitt sera javnt val millum fýra stórar flokkar. -Munurin er ikki størri enn, at tað kann takast aftur. Siga vit, at eini 20 ella kanska 25% ganga leys, so eru tað mong prosent, sum skulu koma uppá pláss til valið. At býta tey javnt út á allar flokkarnar trýr Jógvan Mørkøre ikki uppá.

Hetta er ein kanning, sum er gjørd áðrenn valið og sigur bara nakað um tann dagin fólk verða spurd. Samfelagsfrøðingurin vísir á, at nógvir veljarar liggja og viga ímillum. Atkvøðurnar í dag eru eisini nógv leysari enn tær vóru fyrr.

Jógvan Mørkøre hevur tí einki boð uppá, hvør kann gerast vinnari í valinum: - Hetta er sum í fótbólti. Tað er sjáldan, at tað liðið, sum liggur fremst í fyrstu hálvu endar við at blíva Føroyameistari. So alt kann henda.

Tann flokkurin, sum hevur tyngstu mótbrekkuna sambart veljarakanningini er Fólkaflokkurin, men hann plagar at duga væl at liggja í bakhjóli og so taka seg fram í seinasta umfarinum.

Jógvan Mørkøre sigur víðari, at tað er so nógv óvissa í tølunum, at heldur ikki Tjóðveldisflokkurin skal kenna seg ov tryggan. Við eina kanning undan seinasta fólkatingsvali lá Tjóðveldisflokkurin t.d. eisini væl fyri men endaði við ongan mann at fáa. Tveir flokkar yvirhálaðu hann.

Jógvan Mørkøre heldur tað er týdningarmikið, at vit skilja millum fólkatingsval og so løgtingsval. Við fólkatingsval eru tað tveir persónar, sum skulu veljast og ikki flokkar sum so. Fólkatingsval er so nakað annað enn løgtingsval, tí hugsað verður meira um, hvat andlit skal umboða Føroyar mótvegis Danmark. Tað er nokk minni politikkur og meira umboðan í tí.

Út frá hesi sannroynd royna flokkarnir at koyra spíðskandidatarnar fram, men tað kann so ørkymla eitt sindur, at hesir somu eisini eru millum høvuðsevnini til eitt nú løgmansevni ol.

## Løgtingsvalið

Tað ber ikki til at brúka úrslitið av seinastu veljarakanningini sum grundarlag at meta um úrslitið av einum komandi løgtingsvali heldur Jógvan Mørkøre. Hann vísir á, at vit fyrr hava sæð í kanningum upp til fólkatingsval, at tað er meira enn ein triðingur, sum heftir seg við, hvørjir persónarnir eru. Longu har hevur tú eina óvissu. Síðani eru tað eisini atkvøður hjá smærri flokkunum, sum mugu metast at fara til størri flokkarnar, tí tað eru teir, sum fáa fólkatingsmenninar. Og tá er spurningurin, hvussu tær atkvøðurnar fordeila seg.

Vit sóu eisini, at til seinasta fólkatingsval gjørdist Fólkaflokkurin nógv tann størsti, men á løgtingsvalinum datt hann í atvøðutali niður á 3. pláss.

Jógvan Mørkøre sigur, at tað er tó ringt at siga nakað við vissu, tí til hetta fólkatingsvalið er tjóðskaparspurningurin bráddliga vorðin tað allir fokusera uppá, og tað kann gera, at hetta valið verður eitt sindur øðrvísi enn tað seinasta.



*Teir fýra spíðskandidatarnir til fólkatingsvalið*

# Nyrup á eggini

**Nyrup er á veg út úr Forsætismálaráðnum, og Anders Fogh Rasmussen hevur beina kós í ovasta politiska sessin í Danmark. Men spenningur er framvegis íluftini, tí enn hevur fjórði hvør veljari ikki tikið støðu.**

FÓLKATINGSVAL
*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*

Ein vika er nú eftir av valstríðnum íDanmark, Føroyum og Grønlandi, og í Danmark byrjar ein greið mynd at koma til sjóndar: Poul Nyrup Rasmussen fer at tapa fólkatingsvalið, og Anders Fogh Rasmussen úr Vinstraflokkinum verður nýggjur forsætisráðharri.

Tað byrjaði gott hjá Nyrup og Radikala stjórnarflokkinum og stuðulsflokkunum SF og Eindarlistanum. Dagarnar eftir, at forsætisráðharrin hevði skrivað út nýval til Fólkatingið, helt framgongdin í veljarakanningunum fram. Men eftir eina baldruta viku við hørðum valstríðið, har innflytarar og flóttafólk vóru í brennideplinum, kom vend í. Anders Fogh Rasmussen og andstøðuflokkarnir tóku dik á seg, og nú bert ein vika er eftir av valstríðnum, er andstøðan klárt á odda.

## Greiðan meiriluta

Skulu vit trúgva teimum mongu veljarakanningunum, sum verða gjørdar, so vinnur Anders Fogh saman við hinum borgarligu flokkunum umleið 15 fleiri fólkatingssessir enn Nyrup og hansara stuðulsflokkar. Talan er sostatt um ein rættiliga greiðan meiriluta til andstøðuflokkarnar.



*Veljarakanningarnar undan fólkatingsvlainum geva forsætisráðharranum grund til at stúra*

Veljarakanningarnar eru ikki á einum máli um, hvussu stóran valsigur Anders Fogh Rasmussen fer at vinna, men allar hava tað til felags, at tær spáa um borgarligan valsigur. Nærri vit koma valinum, meira álítandi verða veljarakanningarnar, siga teir mongu serfrøðingarnir, sum dagliga nærlesa og tulka kanningarnar.

## Ikki tikið støðu

Hetta merkir tó ikki, at allur spenningurin er farin úr valstríðnum. Enn er spenningurin sera stórur, og alt kann henda hesa seinastu vikuna, siga eygleiðarar. Seinasta vikan er altavgerandi, og nógv minnast aftur á seinasta val, tá ið Uffe Ellemann Jensen var so væl fyri í veljarakanningunum, at hann var næstan vísur íat gerast forsætisráðharri. Tað gjørdi hann sum kunnugt ikki, tí tað eydnaðist Nyrup at venda gongdini seinastu dagarnar upp undir valið.

Hetta minnist Anders Fogh Rasmussen eisini, og ferð aftaná ferð endurtekur hann, at einki er avgjørt fyrrenn seinasta atkvøðan er tald. Og Nyrup vónar, at hann einaferð enn skal megna at venda gongdini.

At einki er avgjørt enn, sæst eisini aftur í veljarakanningunum. Tær vísa nevniliga, at fjórði hvør veljari ikki hevur gjørt upp við seg sjálvan enn, hvar krossurin skal setast týsdagin. Tað hevur tísera stóran týdning hjá báðum pørtum at vinna undirtøku millum tey mongu ivandi, og stríðið verður hart komandi dagarnar.

## Keðiligt valstríð

Tað eru tey, sum siga, at valstríðið ikki byrjar av álvara fyrrenn nú. Enn hevur tað verið eitt rættiliga keðiligt valstríð, har tað viðhvørt hevur verið truplult at síggja munin millum Fogh og Nyrup, tí teir eru so samdir á nógvum økjum. Harafturat vilja teir fevna um so stóran part av veljarafjøldini, at hvørgin teirra meldar nóg greitt út, hvønn politikk teir vilja reka. Flóttafólk og innflytarar hava fylt alt ov nógv í valstríðnum, og ov lítið hevur verið tosað um aðrar gerandistrupulleikar hjá danska fólkinum, so sum eldrarøkt, bíðirøðir á sjúkrahúsunum, høga skattatrýstið og familjupolitikk.

Kanska bíðar tann fjórðingurin, sum enn ikki hevur tikið støðu, eftir greiðum útmeldinum á hesum og øðrum økjum. Í øllum førum verða tað hesir veljararnir, sum gera av, um forsætisráðharrin skal eita Fogh ella Nyrup.